# Lættari at halda strong krøv

**Krøvini til reinføri á virkjum og skipum eru strong, men á Blika gera tey tað munandi lættari at halda hesi krøvini**

**VINNA**

Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Reinføri er vorðið eitt lyklaorð í allari matframleiðslu og krøvini til reinføri á virkjum og umborð á skipum, eru hørð.

Men tað kann vera torført at lúka krøvini. Tað kann vera torført at vaska so væl í hvørjum lítlum króki og hvørjari lítlari rivu, at ikki onkur bakteria fær smoygt sær undan.

Og skulu royndir takast, er mangan neyðugt at brynja seg við toli, tí tað kunnu ganga dagar at fáa úrslitið.

Men á Fish Fair kunnu tey á Blika vísa tykkum ein máta, sum ger tað munandi lættari og skjótari hjá skipum og virkjum at kanna eftir um reinførið er ílagi.

Og her er talan um reinførið í víðastu merking.

- Vit selja sápur, vaskievni og útgerð at vaska skip og bátar við, sigu Rúni Nielsen, sølumaður og ráðgevari hjá Blika.

Men eitt er tann skitturin, sum sæst við eyganum. Tann heilt stóra avbjóðingin er at sleppa av við skittin, sum ikki sæst. Men her hevur Blika eisini kanningartól av ymsum slagi, sum í eini handavending kunnu vísa, um bakteriur eru á einum skeriborði, einum knívi, eini slaktarasag, ella hvørjum tað skal vera.

- Talan er um ein mátara, har tað ikki tekur meiri enn 15 sekund at kanna eftir, um bakteriur eru til staðar ella ikki.

Sostatt er óneyðugt at senda royndir til Heilsufrøðiligu starvsstovuna til kanningar og at bíða í dagar eftir úrslitinum.

## Staðfesting og fyribyrging

Einaferð varð ein lækni spurdur um hann kundi geva fólki trý góð ráð um, hvussu tey skuldu sleppa undan nógvum sjúkum.

Tá svaraði hann at tey trý ráðini eru: Vaska hendur, vaska hendur og vaska hendur. So stóran týdning metti hann, at tað hevði, at vera reinur um hendurnar.

Á Fish Fair fer Blika eisini at vísa eitt nýtt tól, ið mátar um starvsfólk, sum hava við mat at gera, vaska sær nóg væl um hendurnar og tað hevur ómetaligan stóran týdning sum fyribyrgjandi tiltak, bæði í flakavinnuni og í aðrari matframleiðslu.



*Í eini verð, har alt gongur skjótari og skjótari, er tað ein veldugur fyrimunur at kunna fyribyrgja og at staðfesta trupulleikar so skjótt, sum gjørligt, sigur Rúni Nielsen á Blika*

- Tað er eisini nýtt, at vit hava útgerð, sum upp á 24 tímar kann staðfesta, sum lívshættisliga listeria bakterian er til staðar í fiskavørum.

- Hetta er ein snarkanning, har tað fyrr kundi vera neyðugt at bíða leingi eftir úrslitinum.

Somuleiðis hevur Blika útgerð, har tað upp á nøkur fá sekund ber til at kanna eina rávøru fyri dálking av nógvum ymsum slagi.

- Tá ið royndin er tikin, verður hon send fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna og so kann Heilsufrøðiliga Starvsstovan gera eitt yvirlit yvir um rávøran er dálka við bakterium, ella hvørjum tað skal vera.

- Hesin mátin at kanna eina rávøru uppá, tryggjar, at vit fáa eina meiri nágreiniliga kanning, tí nú slepst undan at senda fiskaroyndir og royndir av aðrari ráværu, til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, har tað kann koma at liggja í nakrar dagar. Tað kann nógv henda í bíðitíðini og tí er ikki vist, at kanningarúrslitið vísir akkurát, hvørja støðu ráværan var í, tá ið royndin varð tikin.

## Dygdarváttan

Tað er ein veldugur fyrimunur at fáa kannað beinanvegin um útgerð og amboð eru nóg væl vaskað, ella um tað er neyðugt við einum umgangi afturat og sjálvandi hevur tað eisini alstóran týdning at staðfesta bakteriur og annað í matvørum, á amboðum og útgerð og á hondum, so skjótt sum gjørligt, bæði umborð á skipum og á virkjum.

- Í dag gongur alt skjótt fyriseg, men hesir kanningarættir tryggja, at trupulleikar kunnu staðfestast so tíðliga at tað ber til at steðga eini sending, longu áðrenn hon er farin av landinum og sotatt áðrenn hon er send á marknaðin og skaðar okkara umdømi.

- Men hetta eru eisini kanningar, sum virki og skip kunnu brúka sum eina dygdarváttan, sigur Rúni Nielsen.

Somueleiðis er tað munandi lættari at gera kanningar, sum fyribyrgja dálking við bakterium.

Hann leggur afturat, at hendan útgerðin er so løtt at brúka, at tað kunnu øll finna útav, uttan at vera professari.

Nær kom kaffið til Føroya?



**Seinasta sunnudag við Faroe Ship, sjálvandi!**
Hvørja viku er skipið løtt við kaffi, te og øllum tí, sum modernaði føroyingurin sær sum sjálvfylgjur. Hvørja viku, alt árið. Við Faroe Ship kemur stórur partur av gerandisdegnum til landið.

Síðan 1919 hevur Faroe Ship verið fremsta samband føroyinga við útheimin. Frá fyrstu túrunum við »Tjaldrinum«, til Faroe Ship gjørdist liður í flutningskervinum hjá Eimskip – heilt úr Kina til Hamburg og á Havnarvág.

REPROZ

FAROE SHIP
Góð sambond síðan 1919

Sosialurin